**Býráðsfundur 30.10.2023 kl. 18.00**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhølið | |
| Hjástødd: | Súni í Hjøllum, borgarstjóri | x |
| | Heini S. Kristiansen | Avboð |
| | Høgni Hansen | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Jan Højgaard | x |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Rannvá í Túni Petersen | x |
| | Elsbet E. Magnussen, skrivari | x |

**Mál til viðgerðar:**

| | |
|---|---|
| Mál nr. 84/2023 – Fríðkan uttanfyri kommunuskrivstovuna | ALMENT |
| Mál nr. 85/2023 – Uppstigan av reinsiverkinum | ALMENT |
| Mál nr. 86/2023 – Umsókn um marknaumskipan | ALMENT |
| Mál nr. 87/2023 – Fíggjarætlan 2024 – Skálafjarða Sløkkilið | ALMENT |
| Mál nr. 88/2023 – Fíggjarætlan 2024 – Nes kommuna | ALMENT |
| Mál nr. 89/2023 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 90/2023 – Umsókn um byggiloyvi – Tórhild Kvilt Olsen og Jógvan Nón | ALMENT |
| Mál nr. 91/2023 – Umsókn um byggiloyvi – Katrin Olsen og Árni Højgaard | ALMENT |

**Mál nr. 84/2023 – Fríðkan uttanfyri kommunuskrivstovuna ALMENT**

J.nr.: 2801-3-2023

Nes kommuna hevur eftir áheitan fingið tilboð frá Haraldi S. Hammer uppá at leggja flísar á økið sunnanfyri kommunuskrivstovuna.

**Á fundi tann 18.10.2023 mælir meirilutin í Tekniska nevnd, Dakko Petersen og Elin á Torkilsheyggi, til at taka av tilboðnum. Minnilutin, Jan Højgaard, var ímóti ætlanini.**

**Á fundi, tann 27.10.2023, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við meirilutanum í Teknisku nevnd og taka av tilboðnum. Fíggingin verður tikin av stovninum "Aðrar kommunalar útreiðslur".**

**Tilmælið hjá meirilutanin í Teknisku nevnd og hjá Fíggjarnevndini varð samtykt. Tey, ið atkvøddu fyri, vóru Sùni í Hjøllum, Dakko Petersen, Elin á Torkilsheyggi, Høgni Hansen og Rannvá í Túni Petersen. Jan Højgaard atkvøddi ikki.**

**Mál nr. 85/2023 – Uppstigan av reinsiverkinum ALMENT**
J.nr.: 1204-1-2023

Aftaná at hava royndarkoyrt eina pilotverkætlan á reinsiverkinum, hevur MEST staðfest, at skipanin er ein dygdargóð loysn fyri drekkivatnið í Nes kommunu. Skipanin inniber at seta kolfiltur inn í verandi skipan á reinsiverkinum.

Sambært Jóhan Petur Petersen frá MEST, kann skipanin tryggja, at farvutalið ikki fer uppum ávíst tal, hóast áarføri er. Orsakað av, at kolfiltrini skulu skiftast regluliga, er eisini ein meting um, hvat skipanin kemur at krevja í árligum rakstrarkostnaði.

**Á fundi, tann 27.10.2023, mælir Fíggjarnevndin til at taka av tilboðnum frá MEST at fíggingin verður tikin av stovninum "Reinsiverki íløga".**

**Tilmælið hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 86/2023 – Umsókn um marknaumskipan ALMENT**
J.nr.: 1205-9-2023

Í telduposti, dagfestur tann 06.10.2023, heitir Umhvørvisstovan á Nes kommunu um at ummæla umsókn um marknaumskipan frá Niclas Foldbo. Talan er um at leggja uttangarðsjørðina, sum er tengd uppí matr. nr. 499c, uppí matr. 727.

**Á fundi tann 18.10.2023 mælir Tekniska nevnd til at viðmæla marknaumskipanini.**

**Tilmælið hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 87/2023 – Fíggjarætlan 2024 – Skálafjarðar Sløkkilið ALMENT**

J.nr.: 1105-7-2023

Skálafjarðar kommunala Sløkkilið hevur sent uppskot um fíggjarætlan fyri 2024 til ummælis hjá kommununi.

Nevndin fyri Skálafjarðar Kommunala Sløkkilið hevur á fundi 26.09.2023 viðgjørt fíggjarætlan og íløguætlan fyri árið 2024. Nevndin mælir til, at gjaldið frá kommununum til SKS verður eins og undnafarna ár kr. 305,00 pr. íbúgva. Grundarlagið fyri útrokningini er íbúgvaratalið tann 01.01.2023.

Íbúgvaratalið í Nes kommunu pr. 01.01.2023 var 1500. Mánaðarliga gjaldið til SKS í 2024 verður kr. 38.125 mánaðarliga, ella í alt kr. 457.500 fyri 2024.

| **Ætlan** | **Æ 2024** | **Æ 2023** |
|---|---|---|
| Gjald pr. íbúgva | 305 | 305 |
| | | |
| **Inntøkur:** | | |
| Kommunur | 2.143.845 | 2.092.300 |
| | | |
| Aðrar inntøkur | 59.673 | 50.000 |
| **Inntøkur í alt** | **2.203.518** | **2.142.300** |
| | | |
| **Útreiðslur:** | | |
| Løn v.m | 1.330.000 | 1.306.000 |
| | | |
| Kostnaður | 474.635 | 463.760 |
| Fyrisiting | 148.883 | 132.200 |
| Bilútreiðslur | 250.000 | 230.000 |
| Meirvirðisgjald | 0 | 0 |
| **Útreiðslur í alt** | **2.131.960** | **2.076.960** |
| | | |
| **Úrslit áðrenn rentur/avskrivingar** | **0** | **10.340** |

| **Íløguætlan 2024** | |
|---|---|
| Keyp av stigabili | 5.958.960 |
| Útgáva av hefti – SKS 50 ár | 150.000 |
| **Íløgur íalt** | **6.108.960** |

| **Íløguætlan deild á kommunurnar** | | **6.108.960** | **stigabil yvir** |
|---|---|---|---|
| **2 ár** | | | |
| Nes kommuna | 21,3% | 1.303.662 | 635.826 |
| Runavíkar kommuna | 61,7% | 3.770.190 | 1.838.808 |
| Sjóvar kommuna | 16,9% | 1.035.108 | 504.846 |

**Á fundi, tann 27.10.2023, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við fíggjar- og íløguætlanini hjá Skálafjarðar Sløkkiliði, soleiðis sum hon er uppsett. Rakstrarútreiðslan á kr. 457.500 og íløgurnar á kr. 635.826 verða settar av á fíggjarætlanini 2024 hjá Nes kommunu.**

**Tilmælið hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 88/2023 – Fíggjarætlan 2024 – Nes kommuna ALMENT**

J.nr.: 1107-2-2023

Fyrsta viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2024 var fyri á býráðsfundi 25.09.2023.

**Fíggjarnevndin mælir til, at høvuðstølini til aðru viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2024, hjá Nes kommunu, eftir broytingar vera hesi:**

| **Rakstur tkr.** | **2024** | **2023 v/eykaj.** | **Munur** |
|---|---|---|---|
| §1 Kommunal fyristing | 6.849 | 6.423 | 426 |
| §2 Almanna- og heilsumál | 25.553 | 22.584 | 2.969 |
| §3 Børn og ung | 15.977 | 14.752 | 1.225 |
| §4 Undirvísing | 5.129 | 5.135 | -6 |
| §5 Mentan og frítíð | 6.904 | 5.236 | 1.668 |
| §6 Teknisk mál | 7.820 | 6.994 | 826 |
| §7 Kommunalt øki | 3.876 | 4.110 | -234 |
| **Rakstur í alt** | **72.108** | **65.234** | **6.874** |
| | | | |
| **§20 Inntøkur v.m.** | **79.966** | **72.537** | **7.429** |
| | | | |
| **Úrslit áðrenn íløgur** | **7.858** | **7.303** | **555** |
| | | | |
| **Íløgur tkr.** | | | |
| §1 Kommunal fyrisiting | 0 | 0 | 0 |
| §2 Almanna- og heilsumál | 70 | 70 | 0 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| §3 Børn og ung | 1.419 | 350 | 1.069 |
| §4 Undirvísing | 2.500 | 2.600 | -100 |
| §5 Mentan og frítíð | 4.540 | 8.885 | -4.345 |
| §6 Teknisk mál | 5.280 | 1.757 | 3.523 |
| §7 Kommunal virki | 3.846 | 12.338 | -8.492 |
| **Íløgur í alt** | **17.655** | **26.000** | **-8.345** |
| **Úrslit aftaná íløgur** | **-9.796** | **-18.697** | **-8.901** |
| **Afturgjald av skuld** | **2.910** | **2.910** | **0** |
| **Av tøkum peningi** | **1.707** | **4.607** | **-2.900** |
| **Lántøka** | **11.000** | **17.000** | **-6.000** |

**Á fundi, tann 27.10.2023, mælir Fíggjarnevndin til, at skattaprosentið verður óbroytt 20,5%, og at barnafrádrátturin verður hækkaður frá kr. 5.500 til kr. 6.000.**

**Tilmælið hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

**Á fundi, tann 27.10.2023, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við 2. viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2024 soleiðis, sum hon er uppsett. Íløgurnar á tkr. 17.655 og afturgjald av skuld á tkr. 2.910, tilsamans tkr. 20.565, verða fíggjaðar við rakstaravlopi á tkr. 7.857, lántøku á tkr. 11.000 og tøkum peningi á tkr. 1.707.**

**Tilmælið hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

Mál nr. 90/2023 – Umsókn um byggiloyvi – Tórhild Kvilt Olsen og Jógvan NónALMENT
J.nr.: 1201-13-2023

Í teldubrævi, dagfest 21.09.2023, søkja Tórhild Kvilt Olsen og Jógvan Nón um byggiloyvi at byggja nýggj sethús á matr. nr. 267h á Høganesvegi 83 á Toftum.

Húsini eru í tveimum hæddum við lágum einvegis takhalli við kjallarahædd undir veghædd.

Talan er um sethús, ið halda seg til tann sethúsadám, ið eyðmerkir økið við nýggju útstykkingina á Høganesvegnum og er innan tey krøv og karmar, ið kommunan setur til sethúsabygging í hesum økinum.

Tekniska deild mælir til at játta byggiloyvi – við teirri treyt, at tekningarnar fáa smávegis dagføringar í upplýsingum, tekningum og orkurammu.

**Býráðið samtykti einmælt at játta byggiloyvi.**

**Mál nr. 91/2023 – Umsókn um byggiloyvi – Katrin Olsen og Árni Højgaard ALMENT**
J.nr.: 1201-14-2023

Í teldubrævi, dagfest 21.09.2023, søkja Katrin Olsen og Árni Højgaard um byggiloyvi at byggja nýggj sethús á matr. nr. 267g á Høganesvegi 81 á Toftum.

Húsini eru í tveimum hæddum við lágum einvegis takhalli við kjallarahædd undir veghædd.

Talan er um sethús, ið halda seg til tann sethúsadám, ið eyðmerkir øki við nýggju útstykkingina á Høganesvegnum og er innan tey krøv og karmar, ið kommunan setur til sethúsabygging í hesum økinum.

Tekniska deild mælir til at játta byggiloyvi – við teirri treyt, at tekningarnar fáa smávegis dagføringar í upplýsingum, tekningum og orkurammu.

**Býráðið samtykti einmælt at játta byggiloyvi.**